

# Taka undir við uppritinum

**Ein minniluti í nevndini** (Hergeir Nielsen, Jógvan við Keldu og Jákup Sverri Kass) tekur í høvuðsheitum undir við uppritinum- og vil við hesum leggja dent á niðanfyristandandi:

### Rættarstøða Føroya

Mælt verður til, at rættarstøða Føroya verður skipað soleiðis, at evsta vald og einkarrætturin til at skipa tað verður lagt til Føroya fólk, og at hetta vald verður útint gjøgnum tess fólkaræðiligu stovnar. Neyðugt er, at føroyingar sjálvir skipa egið lóggávuvald, útinnandi vald (stjórnarvald) og í aðru syftu dómsvald.

Tá ið tað snýr seg um løgverjuna, verður mælt til, at samstarvssemjur verða gjørdar viðvíkjandi útbúgving og kriminaltekniskum kanningum soleiðis, at ein so mikið týdningarmikil partur sum hesin fær ta viðgerð, honum er uppiborið.

Við eini komandi sjálvberandi og sjálvstýrandi tjóð liggur sjálvsagt tað í menningini, at Føroyar fáa altjóðarættarligt virkisføri, og at Føroyar á tann hátt verða síðuskipaðar øðrum sjálvstýrandi tjóðum, ið samstarvast skal við frameftir.

Samsvarandi grein 102 í stovningarsáttmála ST verða einans altjóða sáttmálar hjá suverenum londum, - bygdir á altjóða fólkarætt, - skrásettir har. Rætt, rímiligt og avgerandi er at tryggja framtíðar rættarstøðu Føroya í einum bindandi altjóðasáttmála, sum byggir á altjóða fólkarættin, so at brot á henda er at skilja sum brot á altjóða rætt. — Hesin minnilutin tekur tí undir við, at sáttmálin verður skrásettur samsvarandi grein 102 í stovningarsáttmála Sameindu Tjóða og kunngjørdur har, tí einans soleiðis kann suverenitetur Føroya tryggjast.

### Sjálvstýrisheimildirnar

Tá sjálvstýrisheimildir Føroya eru givnar við fólkatingslóg, er talan um delegatión ella umboð frá ríkinum, sum sjálvandi kann takast aftur og broytast av sama lóggevara, sum er Fólkatingið. Tí eigur sjálvsagt Føroyum at verða grundlógartryggjað rættindi ígjøgnum føroyska grundlóg.

Sum nevnt omanfyri, eru hesi viðurskifti ein týdningarmikil partur av virkisføri Føroya, og av tí at evsta vald verður at liggja hjá Føroya fólki og Løgtinginum, er sera umráðandi, at samráðst verður fram til, at Føroyar bara hava eitt lóggevandi vald, ið er Løgtingið.

Umráðandi er, at Føroyar sleppa undan avmarkaðu heimildum sínum at virka í millumtjóða høpi, har eitt nú mannarættindadómstólurin í Strassbourg verður hildin at vera einasti kærumøguleiki, um yvirskipaða valdið undir heimastýrislógini ger seg inn á eitt undirskipað øki. Hesum eiga føroyingar at sleppa sær undan skjótast gjørligt sum sjálvstýrandi og sjálvberandi tjóð.

### Búskapur

Omanfyri nevndi minniluti leggur stóra herðslu á, at vit búskaparliga grundfesta okkara sjálvstýrandi tjóð trygt, og tekur tí undir við einari varisligari skiftisskipan soleiðis, at vit so væl sum møguligt útinna eina skipan, sum bæði vit og okkara eftirkomarar so trygt sum gjørligt kunnu virka, liva og mennast undir. — Tí tekur hesin minnilutin undir við uppritinum, men ger vart við enn einaferð tað varnið, ið virkast skal undir, tá samráðst verður.

Eingin er betri at verja síni viðurskifti enn ein sjálvur, og tí má tað vera verkevni Føroya fólks at taka fulla ábyrgd av egnum landi og búskapi.

Omanfyri nevndi minniluti tekur sum heild undir við ásetingunum í uppritinum um gjaldoyrasamstarv, búskaparliga skiftisskipan, fyrisitingarligt samstarv, javnstøðu í tjóðskapi, eins og hildið verður rætt og rímiligt at hava greiðar ásetingar um felagsnevnd um sáttmálabroytingar, herundir sáttmálauppsøgn.

Eftir at eitt úrslit fyriliggur, sum gevur Føroyum sjálvstýri, er sjálvsagt, at føroysku fólkatings-sessirnir verða frásagdir.

### Uttanríkispolitisk viðurskifti

Minnilutin heldur tað vera umráðandi at kunna donsku ríkisstjórnina um, at fullveldi ikki merkir, at framhaldandi samstarv verður slept, men ætlanin er tvørturímóti at leita upp skipanir, ið rúma nýggjum møguleikum fyri samstarvi millum tvey javnnsett lond undir somu krúnu.

Samstundis vil minnilutin leggja herðslu á, at Føroyar í fullan mun frameftir luttaka í millumtjóða samstarvi á stjórnarstigi, sum sømir seg einari sjálvstýrandi og sjálvberandi tjóð.

Støða Føroya uttanfyri og Danmarkar innan fyri ES hevur eisini merkt okkara møguleikar fyri handilsligum samstarvi, serliga innan øki, har føroysk og donsk áhugamál ganga tvørt av øðrum.

Havandi í huga, at Dan mark leitar sær longur inn í hetta samstarv, og serliga, at hetta skal gerast uttan fólkaatkvøðu frameftir, fána donsku møguleikarnir fyri at tæna føroyskum áhugamálum til lítar.

Hesin minnilutin mælir tí landsstýrinum til - og metir hetta sera umráðandi - longu nú at kanna eftir og taka upp samstarv við ES, WTO og aðrar okkum viðkomandi felagsskapir, sum kunnu gagna útflutningi Føroya, marknaðaráhugamálum, vinnulívi og harvið føroyska fólkinum dyggiliga.

### Verjupolitisk viðurskifti

Minnilutin heldur, at Føroyar hava verið sera illa fyri í verjupolitiskum høpi líka síðani, kalda kríggið tók seg upp, og fram til dagin í dag.

Havandi í huga, at eingin fær frið longur, enn grannin vil, og at Føroyar liggja í einum hernaðarliga sera viðkvomum øki, er umráðandi, at landsstýrið tekur upp samband við grannalondini og roynir eftir møguleikum fyri samstarvi.

Mælt verður landsstýrinum staðiliga til at taka upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina um rættindi okkara til endurgjald fyri at hava verið skotbjálvi undir kalda krígnum. Hetta endurgjald eigur at verða grundað á tað, ið seinni er komið fram um hesi viðurskifti, har Danmark hevur brúkt Føroyar og Grønland til at sloppið sær undan øðrum útreiðslum.

Umráðandi er, at føroyska tjóðin sjálv ger av, hvussu landið og havøkið kring Føroyar verða skipað í hernaðarligum høpi frameftir.

### Varligar tillagingar

Vísandi til tað, minnilutin higartil hevur nevnt, skal ásannast, at endamálið er at tryggja eitt samráðingarúrslit, sum órógvar føroyska búskapin sum minst og tryggjar føroyskum myndugleikum umstøður at fremja varligar tillagingar av føroyska búskapinum.

Av teirri orsøk, at her er talan um stórar upphæddir, metir minnilutin tað vera grundleggjandi fortreytir, at samráðingarpartarnir verða samdir um eina hóskandi og hóvliga skiftistíð soleiðis, at samfelag okkara kann laga seg til nýggju umstøðurnar sum eitt sjálvberandi og sjálvstýrandi land.

Eingin ivi er um, at samstarv millum brøðratjóðir í fleiri øldir — í við - og mótgangi, - sum verið hevur millum Danmark og Føroyar, frameftir verður eyðkent av góðum og siðiligum samráðingaranda, har báðir partar vísa virðing hvør fyri øðrum, sum tað sømir seg framkomnum fólki.

# Miðflokkurin viðrir samráðingarrættin

**Ein triði minniluti í nevndini** (Jenis av Rana) hevur hesar viðmerkingar til upprit landsstýrisins um samráðingar við danir.

Undir 1. viðgerð á Løgtingi av hesum fyri Føroya fólk so týdningarmikla máli vísti Jenis av Rana á nakrar veikleikar, sum gjørdu, at hann ikki uttan víðari tók undir við ætlanum landsstýrisins. Høvuðssjónarmið hansara var og er framvegis, at **trygdin hjá tí einstaka føroyinginum má setast framum**, eisini evt. fastlæstar floksideologiir. Gjørt varð vart við, at honum líkaði ikki, at landsstýrið fór til samráðingar við danir og kom aftur við endaligum uppskoti, uttan at Løgtingið og Føroya fólk fyrst høvdu havt høvi at síggja og viðgera úrslitini av teimum kanningum, sum gjørdar vóru. Her varð m.a. hugsað um framrokningar av fíggjarlógum fyri komandi ár fyri harvið at fáa hóming av, hvussu livikorini hjá tí einstaka føroyinginum kundu hugsast at verða eftir møguligari stovnan av fullveldi.

Hetta varð ført fram tá, síðani var samband við landsstýrið um júst hetta og aðrar veikleikar í uppskoti landsstýrisins - og varð tað, hann førdi fram, tikið til eftirtektar.

Soleiðis varð føroyingum tryggjað, at

1. orðaskifti varð á løgtingi eftir, at allar kanningar vórðu gjørdar, og áðrenn farið varð undir samáðingar við danir.
2. uttanlandsnevndin var og verður neyvt kunnað og eftirspurd undir samráðingunum.
3. allir flokkar eru umboðaðir í teirri grundlógarnevnd, ið sett varð
4. fólkaatkvøðurnar, ið verða, verða bindandi — og ikki bert vegleiðandi — fyri landsstýrið

Alt hetta fyri at forða fyri, at nakað varð smoygt niður yvir føroyingin í óðum verkum, — veljarin skal neyvt vita fylgjurnar av tí, hann atkvøður um.

Her varð sostatt ein roynd gjørd at fáa ávirkan á uppskot landsstýrisins, heldur enn at seta seg uttan fyri ávirkan.

Føroysku veljararnir valdu teir flokkar, ið nú mynda landsstýrið, í einum lutfalli, ið gjørdi teir førar fyri at finna saman um leiðslu landsins og førda politikkin. Ósamdir ella ikki mega vit virða **demokratiska rætt teirra** at kunna føra samráðingar um broytingar í framtíðar ríkisrættarligu støðu landsins. Uppgávan hjá andstøðupolitikarunum er m.a. at fylgja við arbeiði teirra, royna at bøta um hetta við samráðingum og fremjan av egnum uppskotum heldur enn fyrilitaleyst at arbeiða ímóti.

Hesin minnilutin undrast á og skilir ikki, at landsstýrið í uppleggi sínum ikki viðger hernaðarligu viðurskiftini, sum vit vórðu tengd at, tá NATO støðir vórðu lagdar á føroyskt øki. Tær frágreiðingar, uttanlandsnevndin hevur fingið um, hví hetta týdningarmikla økið ikki er við í uppritinum, hava als ikki verið nøktandi. Nógv bendir á, at hetta skyldast ósemju innanhýsis millum landsstýrisflokkarnar, og er hetta ein veikleiki, sum kann koma okkum aftur um brekku. Minnilutin heitir á landsstýrið um at fáa greiði á hesum øki og væntar, at ítøkiligar ætlanir verða í tí sáttmálauppskoti, sum landsstýrið leggur fyri uttanlandsnevndini, áðrenn farið verður til samráðingar.

Minnilutanum til stúran tykist landsstýrið at taka undir við tilráðingum embætismanna um eina kós, sum uttan iva slóðar leiðir teirra, sum treytaleyst ynskja Føroyar sum komandi ES limaland. Hetta, frammanundan at siga ja til evruna sum gjaldoyra, fær ikki stuðul og viðmæli frá hesum minnilutanum.

Í uppleggi sínum miðar landsstýrið eftir við avtalum við danir at varðveita núverandi støðið á vælferðarsamfelagnum. Minnilutin loyvir sær at minna á, at ein trygd, grundað á hjálp menniskja, altíð verður svikalig. Harnæst harmar tað minnilutan at staðfesta, at førdi politikkurin seinastu tíðina als ikki sannførir um, at tað er trygdin og trivnaðurin hjá **øllum** føroyingum, sum liggur monnum fremst í huga. Hugsan minnilutans er, at djúptgangandi hugburðsbroyting krevst hjá samráðandi landsstýrismonnum, um hesir skulu verða førir fyri at umseta føgru orðini í uppritinum — um trygd, trivna og vælferð — til veruleika fyri borgaran.





# Búskaparligu avleiðingarnar óvissar

**Ein annar minniluti í nevndini** (Jóannes Eidesgaard, Edmund Joensen og Heðin Mortensen) er samdur um hesar felags viðmerkingar og tilráðingar í samband við uppritið, landsstýrið hevur latið uttanlandsnevndini til ummælis í samband við tær samráðingar, verða skulu millum Føroyar og Danmark um ríkisrættarligu støðuna:

Vísandi til samgonguskjalið, løgtingssamtyktina frá okt. 1998, og til uppritið, so er tað ferð eftir ferð sligið fast, at málið hjá landsstýrinum var og framhaldandi er at skipa Føroyar sum eitt fullveldisríki, v.ø.o. loysing. Hesum tekur hesin minnilutin ikki undir við.

Búskaparligu avleiðingarnar av hesi ætlan landsstýrisins liggja í óvissu, tí landsstýrið hevur ikki annað boð enn, at teir ynskja so langa skiftistíð sum gjørligt, umframt eisini kapitalisering og avskriving av skuld. Allar búskaparfrágreiðingar, sum snúgva seg um avleiðingarnar av eini skjótt minkandi ríksiveiting, vísa týðiliga, at vælferðin og livikor føroyinga verða fyri stórum afturstigi. Hetta er ein gongd, sum hesin minnilutin avgjørt vil arbeiða ímóti.

Fullveldisætlanin hevur verið marknaðarførd sum ein verkætlan, ið byggir á nakrar heilt órealistiskar væntanir og vónir um, hvussu bjart alt verður, um bert vit fáa fullveldi. Hetta heldur hesin minnilutin ikki á nakran hátt vera eitt nóg haldgott støði at grunda ein nýggjan búskap á.

Øll tey rættindi og allir teir møguleikar, sum verandi skipan gevur okkum føroyingum sum ein náttúrligur partur av ríkisfelagsskapinum, vil landsstýrið samráða seg fram til at varðveita, eftir at Føroyar hava loyst og eru farnar burtur úr ríkisfelagsskapinum. Hetta er ein vandamikil gongd, sum bert hvílir á danskari vælvild, sum mest minnir um eina biddaragongd. Harafturat vil uppskot landsstýrisins um ábyrgd í Føroyum fyri ávísum málsøkjum, sum Danmark framhaldandi skal umsita, ikki føra til greiðari valds- og ábyrgdarbýti, tvørturímóti.

Tí tekur hesin minnilutin ikki undir við samráðingarupplegginum hjá landsstýrinum og mælir teimum frá at taka upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina við hesum grundarlagi.

Minnilutin mælir í staðin til, at samráðingar verða tiknar upp við ríkisstjórnina um eina nýggja skipan millum londini við greiðum valds- og ábyrgdarbýti. Eina skipan, sum greitt gevur Føroya Løgtingi evsta vald í yvirtiknum málum, og har ongar avmarkingar eru fyri, hvørji mál kunnu verða yvirtikin. Hetta ger Føroya Løgting av.

Úrslitið av komandi samráðingum við donsku stjórnina eigur at gera greitt, hvat ríkisfelagsskapurin í framtíðini fer at bera í sær.

Minnilutin viðurkennir, ar ríkisstuðulin er ein týðandi partur av grundarlagnum undir okkara vælferðarskipan, men at arbeiðast skal framhaldandi ímóti búskaparligum sjálvbjargni, har vælferðin verður varðveitt og ment.

Minnilutin vil, at Føroyar sjálvar stinga út í kortið í uttanríkismálum, tá tað ræður um føroysk viðurskifti.

Minnilutin er samdur um, at tíðin er búgvin til broytingar. Hansara boð skal skiljast sum eitt alternativ til uppskotið frá landsstýrinum. Eitt alternativ, sum er ein skipan í ríkisfelagsskapi við Danmark og Grønlandi, har givnir verða møguleikar fyri reellum og ikki bert formellum sjálvstýri í Føroyum, sum verður ment og útbygt í mun til okkara egnu umsitingarligu og fíggjarligu førleikar.

Umboðini í hesum minnilutanum vísa annars hvør í sínum lagi til uppskotini hjá flokkum sínum um, hvussu teir ynskja, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eiga at verða skipað í framtíðini, og sum eru almannakunngjørd Føroya fólki.

## Álitini handað løgmanni

Uttanlandsnevndin hevur við skrivi, dagfest 25. januar, fingið upprit frá landsstýrinum um samráðingar við donsku ríkisstjórnina um rættarstøðu Føroya. Í skrivinum verður boðað frá, at landsstýrið hevur stevnt donsku ríkisstjórnini til samráðingar um rættarstøðu Føroya, og vil landsstýrið, samsvarandi stýrisskipan Føroya, ráðføra seg við uttanlandsnevndina í hesum sambandi.

Uttanlandsnevndin hevur havt eina røð av fundum, har málið hevur verið viðgjørt, millum annað hevur landsstýrið verið inni og greitt frá og umrøtt einstøku partarnar í uppritinum umframt svarað spurningum.

Nevndin hevur undir viðgerðini av málinum býtt seg í tríggjar minnilutar.

# Skráseting av veitarum klár í apríl

Arbeiði við at fyrireika føroyska vinnuluttøku í einari komandi oljuvinnu gongur støðugt framá. Fleiri virkir arbeiða við at fáa eitt góðkent góðskukervi, og í Vinnuhúsinum verður arbeitt við spurningum sum fevna um vinnuna sum heild

Vinnuhúsið skrivar, at Oljubólkurin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag arbeiður í løtuni við at skipa skráseting av føroyskum veitarum á besta hátt, soleiðis at tey virkir, ið ætla at luttaka fáa so góðar møguleikar sum gjørligt, at gerast sjónlig hjá útlendsku operatørfeløgunum og teirra undirleverandørum. Eisini verður arbeitt við at skipa standardkontraktir fyri veitingar.

Í hesi vikuni verða umboð fyri leiðsluna í Norsku veitaraskránni Achilles og Bretsku veitaraskránni FirstPoint á vitjan í Føroyum, har teir skulu greiða frá sínum skipanum og umrøða samstarvsmøguleikar viðvíkjandi skráseting av føroyskari vinnu.

### Leggjast saman

Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at innan oljuheimin hevur í seinastuni verið tosað um, at báðar nevndu veitaraskráðir møguliga verða lagdar saman til eina fyritøku, ið so kemur at dekka allar veitingar innan oljuvinnuna í norðuratlantshavi og norðsjónum.

Ætlanin er, at karmarnir fyri einari loysn viðvíkjandi skráseting av veitarum, skulu verða greiðir í apríl mánaði. Fyrst í mai skipar Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri einum tiltaki, har feløg við áhuga í oljuvinnuni verða kunna um: Tilmæli um veitaragrunn, sáttmálamodell í leititíðarskeiðnum og møgulig samarbeiðsmodell millum veitarar og oljufeløg, skrivar Vinnuhúsið.




NÝTT HÁR!

Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum. Við okkum hava vit snotuligasta úrvalið av hárkollum og parúkkum.
Vit hava einaumboðan av nýggjari japanskari tægr, sum er einastandandi slitsterk, og tískil serstakliga vælegnað til fólk við kropsliga hørðum arbeiði - til dømis fiskimenn, handverkarar og onnur.
Hárluturin hevur ótrúlig evni at halda hársniði, og verður ikki sleipin sum frálíður. Harumframt er hann sera vælegnaður til varandi áseting.
Og júst varandi áseting er serøki okkara. Lagdur verður ein tráður undir húðina, og síðan verður hárluturin fastgjørdur.
Nú vaskar og greiður tú hárið, sum var tað títt egna. Ein lættur og fittligur máti at endurnýggjað hárið. Sjálvur avger tú alt um lit, snið, bygnað o.s.fr.
Legg til merkis:
Vit eru fremstu útvegarar og serfrøðingar Danmarkar tá umræður øðrvísi hár, so kom innar og hygg at tilfarinum...

**HOTEL HAFNIA** (Loftið)
Leygard. 11. mars og sunnud. 12, mars
frá kl.14.00 - 19.00

**SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK**
Mánad. 13. mars
kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

Henning Toftild
Alternativt Hår Aps
Budolfi Plads 9 DK-9000 Aalborg
tlf: 98 103211 fax: 98 133622
e-mail: alternativt-haar@alternativt-haar.dk
web: www.alternativt-haar.dk

